## Einglabarrin bleiv til Kafe Kaspar

Tað voldi Hotel Hafnia trupulleikar, at tey kallaðu nýístandsettu kafe'ina, sum vanliga verður nevnd Einglabarrin, fyri Nýggja Apotekið. Eftir at landsapotekarin gjørdi vart við, at Apoteksverkið átti navnið, mátti Hotel Hafna broyta navnið aftur. Nú boðar Hotel Hafnia frá, at nýggja navnið er Kafe Kaspar – eftir navnframa tónleikaranum Georg Kaspar Hansen, vanliga nevndur Bakar Hansen, sum búði í reyðu húsunum á Húsabrúgv, sunnan fyri Hotel Hafnia. - Tað er við bestu vælvild, at vita hava eftirlíkað ynskinum frá heilsumyndugleikunum um at sleppa apoteksnavninum, sigur Oddbjørg Højgaard, stjóri á Hotel Hafnia, sum eisini heldur, at Kasparnavnið hóskar fram úr væl til akkurát hetta staðið.



## Saddam-stuðlar stilla upp

Tað hevur vakt ans í Irak og aðrastaðni, at 500 fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava havt samband við fyrrverandi einaræðisharran Saddam Hussein, sleppa at stilla upp til tjóðartingsvalið, sum verður tann 7. mars. Upprunaliga vildu myndugleikarnir ikki loyva teimum 500 at stilla upp, men eftir kravi frá tí sunnimuslimska minnilutanum hevur tann almenna valnevndin staðfest, at tey 500 hava heimild til at stilla upp kortini. Sambært fjølmiðlunum stúrdu teir iraksku myndugleikarnir fyri, at tað kundi elva til ófrið, um Saddam-stuðlarnir ikki sluppu at stilla upp.

# Fiskifrøðilig ráðgeving rívur g

**- Tað er bara ein adressa til tess at fáa útlendskar fiskakeyparar at keypa føroyskar fiskavørur, og hon er Havstovan. Keyparar lurta eftir havgranskingarstovninum ICES, og tað er Havstovan, sum letur ICES síni tilmæli. Haraftrat kemur, at okkara kappingarneytar dríva stórt lobby-virksemi sum ger, at okkara fiskur kemur í ringt ljós, sigur Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari, løgtingsmaður og fiskimálaráðharri, sum er ógvuliga troyttur av at hoyra, at trýstið á okkara fiskastovnar framhaldandi er ov stórt**



RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*myndir: Vilmynd Jacobsen*

- Hví sigur ICES tað, tey siga um, at okkara fiskiveiða ikki er burðardygg? Jú, tað er so einfalt. Tey siga tað, tí Havstovan, sum er okkara ráðgevandi stovnur á økinum, sigur tað. Adressan at byrgja upp fyri áganginum á okkara fiskavørur uttanlands, er bert hin eina. Hon er Havstovan.

So avgjørdur er Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari gjøgnum mong ár, fyrrverandi løgtingsmaður og fiskimálaráðharri.

Hann leggur aftrat, at umframt útsagnirnar úr Føroyum um, at vit ikki fiska burðardygt, fer fram eitt stórt lobby-virksemi, har okkara kappingarneytar á marknaðinum royna at koma okkara fiskiveiði og soleiðis eisini okkara fiskavørum í ringt ljós.

- Tá so okkara fiskavørur verða boykottaðar, verður meiri í teirra part, tó at fiskiveiðan í teimum londum, vit kappast á marknaðinum við, ikki er petti burðardyggari enn okkara fiskiveiða, ið eg virkuliga meti sum burðardygga í núverandi fiskidagaskipan.



*- Vit fáa ongantíð eina javna veiði í øllum fiskastovnum samstundis, og tá er tað næstan líka mikið, hvussu stórur ella lítil fiskiflotin er og verður í framtíðini. Søgan sigur okkum, at tað altíð verður upp- og niðurgongd, sigur fyrrverandi reiðarin og politikarin*

### Úr vón og viti

Olaf Olsen vísir á, at fiskifrøðin fer altíð at siga, at ov nógv verður fiskað. Hetta tykist vera skúvan uttan enda.

- Eg eri ógvuliga, ógvuliga troyttur av at hoyra hetta jabbið upp í saman, og tað ringasta av øllum er, at útsagnirnar, sum koma úr Føroyum, púrasta oyðileggja grundarlagið undir øllum samfelagnum. Ja, hetta eru virkuliga keðiligt og í mínum hugaheimi, sum havi fingist við fiskivinnu alla mína tíð, púrasta úr vón og viti.

Olaf Olsen sigur, at fiskimenn og teir, sum varða av fiskivinnuni, vita ikki alt. Tað veit fiskifrøðin heldur ikki.

Hann heldur, at gróðurkanningarnar, sum Havstovan hevur gjørt seinastu árini, geva okkum eina góða ábending um, hvussu lívsgrundarlagið hjá fiskinum er, og hvussu gongdin kann væntast at verða.

- Vit fáa ongantíð eina javna veiði í øllum fiskastovnum samstundis, og tá er tað næstan líka mikið, hvussu stórur ella lítil fiskiflotin er og verður í framtíðini. Søgan sigur okkum, at tað altíð verður upp- og niðurgongd.

Olaf Olsen vísir til útróðrarflotan og teir, sum fara á flot av og á.

- Tað hevur altíð verið ymiskt, hvussu slík veiða roynist. Viðhvørt er nógv at fáa, og viðhvørt er lítið at fáa. Tá lítið er at fáa, tíma menn ikki at loysa, tí tað gevur einki kortini. Tí sigi eg: Latið menn fiska, tá fiskur er – og tá einki er, gerst ikki við. Men fiskurin kemur aftur. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað altíð at vera.

Fyrrverandi reiðarin og skiparin reisir eisini spurningin, hvør hevur førleika at meta um veiði og veiðitrýst.

- Einki ringt um, at ein kvinna, sum ongar royndir hevur innan fiskiveiði, er forkvinna í løgtingsins fiskivinnunevnd. Men hvaðani fær hon sín kunnleika og sína ráðgeving. Hon kann væl ikki siga annað enn tað, sum onnur siga henni. Tað er so einfalt. Hon hevur sína ráðgeving, og hvør er ráðgevingin? Tað er stovnurin, sum altíð fer at halda, at vit fiska ov nógv. Tískil er væntandi, at útsagnirnar hjá henni og øðrum, sum uttan at blunka lurta eftir ráðgevingini, fara at líkjast teimum, sum við sínum tilmælum ríva grundarlagið undan hesum samfelag, leggur hann aftrat.

### Stórar avleiðingar

Olaf Olsen nevnir avleiðingarnar av hesi sonevndu ráðgeving, sum higartil hevur ført til, at hýsa undan Føroyum ikki kann virkast og seljast á bretska marknaðinum.

- Vit sóu nú um dagarnar, at virkið á Eiði læt aftur, tí grundarlagið undir virkseminum er burtur. Kvinnur, sum arbeiddu á virkinum, fara heim, og sum tíðin gongur, og ilt er at finna annað arbeiði, taka tær børnini úr barnagørðum og fara at passa tey sjálvi – og so gerast aftur fólk arbeiðsleys har. At slíkt virksemi heldur uppat, kann skjótt gera, at ringarnir breiða seg, so avleiðingarnar á ymiskan hátt breiða seg út um samfelagið.

Fyrrverandi reiðarin, skiparin og politikarin vísir á, at føroyingar eiga umleið 500.000 tons at fiska, tá pelagiska veiðan er íroknað eins og tann býtisfiskur, vit